Atlantic Airways
Vagar Airport
FO-380 Sørvágur

Telefon...............+298 34 10 00
Telefax...............+298 34 10 01
Heimasíða:.........www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

# Ársaðalfundur í P/F Atlantic Airways

## Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Atlantic Airways hósdagin 25. mars 2010 kl. 16:00 á 62°N Airport Hotel (Hotel Vágar) í Sørvági

**DAGSSKRÁ**

**1. Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra**

**2. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna ári**

**3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar**

**4. Uppskot frá nevndini um hvussu ársavlop ella tap sambært góðkenda roknskapinum skal verða nýtt ella dekkað**
Nevnd felagsins mælir til, at úrslitið verður flutt fram til næsta ár, og at einki vinningsbýti verður útgoldið til partaeigarar felagsins.

**5. Uppskot um viðtøkubroyting**
Nevndin skjýtur upp fylgjandi broytingar í viðtøkum felagsins:

Uppskot um at § 5 verður soljóðandi: "Nevndin í felagnum gevur í fyrsta lagi 28 dagar og í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin boð um fundin við útgreinan av tíð, stað og fundarskrá. Fráboðanin skal vera skrivlig til hvønn einstakan partaeigara og skal verða send til bústaðin, sum seinast er skrásettur í partabrævabókini ella við lýsing í almennum føroyskum lýsingarblaði. Innkallingin kann verða givin við teldubrævi, og tað er ábyrgdin hjá partaeigarunum at tryggja sær, at leiðsla felagsins hevur rætta teldubústaðin um hendi."

Uppskot um at § 6, nr. 2 verður soljóðandi: "Framløga av grannskoðaðari ársfrásøgn til góðkenningar."

Uppskot um at § 10, stk. 1, síðsta punktum verður soljóðandi: "Atkvøðurættur kann fremjast við skrivligari fulltrú, ið ikki kann gevast fyri meir enn 12 mánaðir. Fulltrú til nevndina kann einans veitast til ein ávísan aðalfund við eini frammanundan kendari fundarskrá."

Uppskot um at § 15, stk. 1 verður soljóðandi: "Í nevndina eru 4 limir valdir av aðalfundinum. Afturat hesum koma teir limir, ið lóggávan annars ásetir."

Uppskot um eitt nýtt § 15, stk. 5, ið verður soljóðandi: "Um ein nevndarlimur tekur seg úr nevndini í úrtíð, kallar nevndin innan 4 vikur til eykaaðalfundar til val av nýggjum nevndarlimi fyri restina av valtíðarskeiðnum. Nevndin kann tó, um nevndin er viðtøkufør, hóast viðkomandi hevur tikið seg úr, útskjóta spurningin um val av nýggjum nevndarlimi til komandi ársaðalfund."

Uppskot um at § 17, 1. punktum verður soljóðandi: "Fyri at avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, krevst, at meirilutin av nevndarlimunum er á fundi."

Uppskot um at § 18, stk. 2 verður soljóðandi: "Nevndarfrágreiðing frá nevndarfundi verður gjørd og undirskrivað av øllum luttakarunum. Ein luttakari, ið ikki er samdur í avgerð nevndarinnar, hevur rætt til at fáa sína meining felda niður í nevndarfrágreiðingina."

Uppskot um at § 19, 2. punktum verður soljóðandi: "Grannskoðarin skal vera løggildur."

Uppskot um at § 21 verður soljóðandi: "Grannskoðan av ársfrásøgn felagsins verður framd av tí á aðalfundinum valda grannskoðaranum."

**6. Val av nevndarlimum**
Sbrt. grein 15, stk. 1. í viðtøkum felagsins skal aðalfundurin velja 4 limir í nevnd felagsins fyri eitt ár í senn.

**7. Val av grannskoðara**
Nevndin mælir til afturval av grannskoðara felagsins, NOTA, løggilt grannskoðanarvirki P/F, Hoyvíksvegur 5, 100 Tórshavn.

**8. Uppskot frá partaeigara**
Ein partaeigari er komin við fylgjandi evnum til umrøðu:
– Almenn útsøgn frá høvuðspartaeigara um, at neyðugt er við meiri kapping ímóti Atlantsflogi.
– Samstarvið millum Atlantsflog og Vága floghavn og møgulig mótsøgn í áhugamálum hjá høvuðspartaeigara, har peningur verður fluttur frá flogfelagnum til onnur partafeløg, sum landsstýrið er høvuðspartaeigari í.
– Søla av meiriluta av partabrøvunum í Atlantsflogi til privatar íleggjarar, afturkeyp av partabrøvum frá privatum íleggjarum ella umlegging av partabrøvum hjá privatum íleggjarum til ábyrgdar/partapening við fastari rentu, fyri at loysa mótstríðandi áhugamál millum landsstýrið og privatar íleggjarar (hvørs áhugamál ikki verða røktað).
– Visjónir hjá nevndini fyri framtíðina, og hvussu hetta sampakkar við áhugamál og gerðir hjá høvuðspartaeigaranum.

**Bílegging av atgongumerkjum og atkvøðuseðlum**
Atgongumerki og atkvøðuseðlar skulu bíleggjast á telduposti ir@atlantic.fo ella á høvuðsskrivstovu felagsins á telefon 341030. Seinasta freist fyri bílegging av atgongumerki og atkvøðuseðlum er **mánadagin 22. mars kl. 16:00.**

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika til at geva øðrum skrivliga fulltrú til at møta tygara vegna. Á heimasíðu felagsins www.atlantic.fo og á høvuðskrivstovu felagsins er eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi. Fulltrú skal vera felagnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 22. mars kl. 16:00.**

Við bílegging av atgongumerki og atkvøðuseðlum skal førast prógv fyri, at viðkomandi er partaeigari. Fyri partaeigarar, hvørs partabrøv ikki eru skrásett við navni, verða útgivin atgongumerki og atkvøðuseðlar ímóti ávísing av eini í mesta lagi 5 daga gamlari útskrift frá Værdipapircentralen A/S ella frá tí kontoførandi peningastovninum (depotstaðið), sum skjalprógv fyri partabrævaognini. Við útskriftini skal fylgja skrivlig váttan fyri, at partabrøvini ikki eru ella verða avhendað til onnur, áðrenn aðalfundurin er hildin.

**Partapeningur, atkvøðurættur og aðalfundurin**
Partapeningur felagsins er kr. 103.500.000 býttur sundur í 1.035.000 partabrøv á kr. 100,00 og multipla av hesum. Felagið hevur 11.111 egin partabrøv, ið ikki hava atkvøðurætt. Eingi partabrøv hava framíhjárættindi. Partabrøvini skulu vera navnapartabrøv og eru negotiabul. Partaeigarar hava ikki skyldu til at lata partabrøv síni innloysa.

Í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin verða fundarskrá, ársroknskapur 2009 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing og øll uppskot til fundin løgd fram til gjøgnumlestur á høvuðsskrivstovu felagsins, Vága Floghavn, 380 Sørvágur.

Partaeigari, sum sambært partabrævabókini kann prógva við skrásettum partabrævi, at hann er partaeigari, hevur atgongd til og atkvøðurætt á aðalfundinum, um viðkomandi í seinasta lagi 5 dagar frammanundan hevur biðið um atgongumerki.

Atkvøðurættur kann fremjast við skrivligari fulltrú.

Partaeigari felagsins hevur eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 100, hann eigur í partapeningi. Fyri at geva atkvøðurætt krevst, at partabrøvini eru skrásett í partabrævabók felagsins, áðrenn aðalfundurin verður hildin.

Allar avgerðir á aðalfundinum verða tiknar við vanligum meiriluta av atkvøðum, um ikki annað er ásett í galdandi partafelagslóg.

Uppskot um broytingar av viðtøkum felagsins kunnu bert samtykkjast, um uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av greiddum atkvøðum og av tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum.

**Kontoførandi peningastovnur**
Felagið hevur gjørt samskipanaravtalu við Værdipapircentralen A/S. Felagið hevur kosið sær FIH Erhvervsbank A/S til kontoførandi peningastovn, og kunnu partaeigarar felagsins venda sær til henda peningastovn á adressuni Langelinie Allé 43, DK-2100 København Ø, Danmark, á heimasíðuni www.fih.dk ella á telefon nummar +45 72225000 fyri at útinna fíggjarligu rættindi síni í felagnum.

***P/F Atlantic Airways***
***Nevndin***